TELDU-
DREYMAR?
GER OLIVETTI KVETTI!
Aldri hava tilboðini verið betur og tilhoyrið meiri...hyggið bert her!

OLIVETTI
PCS 5130
-PENTIUM 100Mhz
-850Mb Harðdisk
-14" litskerm
-Mús og knappaborð
-Wind. 95 og Works 4.0
-CorelDraw
-Fax-modem
-Ljóðkort
-CD rom
Við 8Mb RAM
13.200,-
V/ MVG

OLIVETTI
PCS 5140
-PENTIUM 133Mhz
-1,2 Gb Harðdisk
-14" litskerm
-Mús og knappaborð
-Wind. 95 og Works 4.0
-CorelDraw
-Fax-modem
-Ljóðkort
-CD rom
Við 8Mb RAM
15.800,-
V/ MVG

8Mb RAM eyka 620,- V/ MVG

COM DATA P/F
TORSHAVN, Tlf 16173
KLAKSVIK, Tlf 56173
GLYVRAR, Tlf 49840

Frøin stór í Lopra:

Undirgrundin er so mikið áhugaverd at borað verður víðari

JAN MULLER

Tað verður ikki givið at bora í Lopra á hesum sinni. Í gjár gjørdu tey 19 oljufeløgini, sum eru við í verkætlanini, av at leggja 5 mill. kr. aftrat á borðið. Sostatt kann arbeiðið halda fram.

Frøin er stór í Lopra og í øllum økinum har nærhendis, tí virksemi í triggjar vikur aftrat kastar eisini av sær til plássini har. Men frøðin er ikki minni hjá bæði føroyskum oljumyndugleikum og hjá teimum, ið standa fyri hesi stóru og spennandi uppgávu.

Arne Rosenkrands Larsen hjá Dopas er tann, sum vegna øll oljufeløgini úttalar seg til pressuna. Orsakað av at úrslitið av boringini ikki skal út til almenningin nú, er tað avmarkað, hvat hann kann siga.

Men Sosialurin skilur, at hann og hansara starvsbrøður eru ómetaliga fegnir um, at tað nú verður hildið fram við boringini.

-Nú er so bert at vóna, at vit kunnu loysa teir trupulleikar, sum eru, og sleppa í gongd aftur at bora, sigur hann og vísir á, at teir hava fingið útgerð til landið, sum skal fáa borin uppaftur.

Ein kann rokna við, at tað fer at taka eina viku til 10 dagar at fáa borihaldið reinsað aftur. Síðani fer boringin at halda fram í einar 10 til 14 dagar aftrat.

Arne Rosenkrands Larsen vil ikki upplýsa, hvussu langt niður teir eru komnir, men Sosialurin hevur skilt, at borurin stendur fastur á 3200 metra dýpi. Tvs. at har eru 300 metrar eftir at bora fyri at røkka tí upprunaliga málinum.

Niður á 4000 m?

Nú tá feløgini aftur hava sett pengar í verkætlanina er tað spurningurin, um ikki upprunaliga verkætlanin verður broytt tilsvarandi, soleiðis at borað verður niður á 4000 metrar, tvs. 500 metrar longur enn ætlað.

Hetta hevur Arne Rosenkrands Larsen onga viðmerking til. Uppá fyrispurning um ein boritíð uppá 10 til 14 dagar aftrat ikki heldur sníýr seg um at bora 800 metrar aftrat enn teir 300, sum resta í at røkka upprunaliga setninginum, sigur Arne Rosenkrands Larsen, at hann kann ikki gera nakra viðmerking til tað heldur.

Annars kann sigast, at gongur tað væl at bora og samanbera vit við boringina, soleiðis sum hon hevur gingið, tá hon gekk uppá tað besta og helst í bleytum tilfari, so kunnu teir bora meira enn 50 metrar um samdøgrið, og tað vil siga, at tað fer at taka einar 4-6 dagar at bora niður á 3500 metrar. Skulu so borast 500 metrar aftrat, so vil talan vera um einar 6-8 dagar aftrat, og tá er so samanlagt talan um einar 10-14 dagar meira. Men sum sagt, eingin viðmerking er til hetta roknistykkið.

Sambært útvarpinum í gjár so verður hildið fram við boringini, tí teir hava fingið so nógv áhugavert at vita longu. Arne Rosenkrands Larsen sigur, at feløgini vilja hava so nógv at vita sum tilber. Tað dýra við slíkari verkætlan er at koma í gongd, og tí vilja feløgini fegin fáa tað burtur úr sum fáast kann fyri pengarnar og fyri tað nakað aftrat.

Hann vísir á, at tað er sjálvandi ikki bert jarðfrøðin, sum er áhugaverd fyri feløgini. Hetta at tey eisini kunnu fáa royndir í sambandi við at bora í føroysku undirgrundini hevur eisini nógv at siga. Tað kann hava stórt virði fyri feløgini seinni.

Uppá fyrispurning um fleiri feløg eru sinnað at vera við sigur hann, at einki fyriliggur um tað í løtuni, men onnur feløg hava møguleika at koma uppí, tá boringin er liðug.

Lisensrunda seinkað

Upprunaliga varð ætlanin at fáa eitt endaligt úrslit frá hesi boringini út á veturin og helst áðrenn ársskiftið. Hetta tí at upplýsingarnir skuldu vera við í metingunum í sambandi við eina lisensrundu. Nú tá okkurt bendir á, at tann fyrsta útbjóðingarrundan við Føroyar verður enn meira seinkað og at vit kanska ikki fáa oljulóggávuna fyri tingið fyrr enn í næsta ár, er tað so kanska heldur ikki so umráðandi at fáa eitt úrslit frá Lopra klárt so skjótt.

Arne Rosenkrands Larsen sigur seg hava skilt, at ein seinkan verður í lisensumfarinum, og hetta merkir sjálvandi, at tað er ikki so kritiskt at hava øll úrslitini við ársskiftið. Í tí sambandi kann ein siga, at hetta er ein fyrimunur.



Nú er grønt ljós givið fyri framhald av boriarbeiðinum í Lopra. Mynd: Jan

Næmingar og lærari á Handilsskúlanum klárir at fara til Skotlands at læra um olju. Mynd: Kalmar

Handilsskúlanæmingar til Skotlands at læra um olju

JAN MULLER

Í gjár fóru 15 næmingar og ein lærari á Handilsskúlanum í Havn á kunningarferð til Skotlands. Har skulu teir kunna seg við oljuídnaðin og útbúgvingarmøguleikar fyri føroyingar í hesi vinnu í Skotlandi.

2 HH B á Handilsskúlanum verður í Aberdenn til 14. oktober. Tvey í flokkinum skulu hesa tíðina vera eftir í Føroyum, har tey m.a. í sambandi við Oljufyrisitingina skulu gera kanningar.

Flokkurin hevur annars fyrireikað seg væl til túrin. Tey skulu vitja á Robert Gordon universitetinum í Aberdeem, har ein av leiðarunum, David Sagar fer at greiða frá.

Tey hava somuleiðis fingið samband við blaðmannin Jeremy Chreswell, sum arbeiðir burturav við oljuspurningum á blaðnum Press and Journal. Hann nemur sær í løtuni kunnleika á universitetinum og er høvuðsuppgáva hansara nettup um Føroyar og olju. Hann arbeiðir við einum projekti um føroyska oljudreymin og um, hvussu føroyska vinnulívið er fyrireikað at taka ímóti eini oljuvinnu.

Ætlanin er so eisini at vitja oljufelagið Amerada Hess, sum er eitt av teimum virknu á føroyska økinum.